# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Útvarpskórið í Eysturríki

1970: Í juli mánaði hetta árið fór Útvarpskórið til Europa Cantat í eysturríkska býnum Graz. Á stevnuni, ið bar heitið "Europa Cantat IV", vóru í alt 50 kór við eini 3000 sangarum. Stevnan varð fyriskipað av einum felagsskapi, sum á týskum nevndist Die Europaische Føderation Junger Cohre"

*Kelda: Árið ið fór*

# Fimm róðrar avgjørdir

**Á vestanstevnu vórðu heili fimm føroyameistarar funnir, tá kappróðurin var av. Alt gekk væl undir róðrinum og íalt tók tað knapt tveir tímar at avgreiða róðurin í Miðvági leygardagin**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Eysturoyingur avgjørdi føroyameistarakappingina hjá tíggjumannaførunum leygardagin. Hinir fýra bátarnir, sum longu eru føroyameistarar, eru: Jarnbardur, Blikur, Sílið og Nevið Reyða*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jarnbardur, Blikur við gentum, Nevið Reyða, Sílið við kvinnum og Eysturoyingur kunnu nú kalla seg føroyameistarar í kapplóðri 2005. Hetta varð greitt eftir kappróðurin á vestanstevnu. Allir hesir bátarnir vunnu teirra róður.

Kvinnurnar á Jarnbardi hava framvegis ikki tapt ein róður síðani norðoyastevnu í fjør, og í Miðvági staðfestu tær teirra oddasess í kappingini við at vinda burtur úr øllum hinum bátunum og komu á mál tvær bátslongdir framman fyri Riddaran.

Gentumanningin á Bliki helt fram í stórum stíli og komu aftur fremstar á mál. Tað var leyst aftur til hinar bátarnar, og frøin var stór á teimum, tá føroyameistaraheitið varð tryggjað.

Nevið Reyða, sum vann sera sannførandi á Fjarðastevnu, vórðu nakað hóttir leygardagin av Kvívíkingi, men klaksvíkingarnir lótu tó ongan iva vera um, hvør skuldi vinna róðurin og vóru nærum eina bátslongd frammanfyri, tá teir fóru um málstrikuna.

Sílið úr Havn fekk uppreisn, eftir at Fípan Fagra heldur óvæntað vann róðurin á Skála. Sílakvinnurnar fingu togað føroyameistaraheitið í land við einum sigri í Miðvági, og tað var eisini málið hjá teimum.

Eysturoyingur vant eisini burtur úr hinum tíggjumannaførunum á 1.000 metrum. Mest óvæntað var tað kanska, at Havnarbáturin gjørdist nummar tvey og Nólsoyingur nummar trý.

### Lítil spenningur

Tveir róðrar eru ikki avgjørdir. Fimmmannafør við dreingjum og seksmannafør við monnum. Men har er støðan tann, at Fípan Fagra liggur trý stig framman fyri nummar tvey, sum er Ritan, og Gongurólvur liggur seks stig framman fyri Jarnbard. Tað skal sostatt nógv til, fyri at føroyameistaraheitið skal gleppa teimum á Gongurólvi av hondum. Ongin ivi man vera um, at menninir á Gongurólvi vilja vinna Ólavsøkuróðurin, nú Strálan av Strondum snýtti alt og øll og kom fyrst á mál í Miðvági.

Tað er sostatt ikki tann stóri spenningurin eftir í kappingini um føroyameistaraheitini undan róðrinum á Ólavsøku, men hinvegin er kappróðurin á Ólavsøku altíð spennandi, tí allar manningar eru eyka uppsettar til at vinna tann róðurin. Kappróðrarfólk plaga at samanbera Ólavsøkuróðurin við steypafinaluna í fótbólti. Um tað ikki eydnast einari manning at gerast føroyameistari, er tað altíð eitt plástur á sárið og ein fínur endi á kappingarárinum at vinna Ólavsøkuróðurin.

Stór frásøgn frá kappróðrinum í Miðvági verður í blaðnum í morgin.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði

**Eirik Andersen**

Sonur Edith Margretu (Diddi) Joensen og Bjørn Asgeir Andersen, Gransherad í Noregi.

andaðist mikudagin 13. juli, 18 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Gransherad kirkju mikudagin 20. juli.

**Diddi, Asgeir, Joar og Just Petter**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Karsten Thomasen**

ættaður av Langasandi, búsitandi í Tórshavn

andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi leygardagin 16. juli 86 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Familjan**

---

## Jarðarferð

**Jógvan Fróðin Bjørgheim Rasmussen**

Vanliga nevndur Jógvan í Grótinum fer til gravar úr Vesturkirkjuni týsdagin 19. juli kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Heiðveig, børn, svigarbørn og abbabørn**

---

**Dagurin**

17. juli. Aleksius, deyður umleið ár 430. Hann var sonur ein rómverskan senator, men fór ungur heimanífrá og livdi sum biddari og kristin prædikumaður í 17 ár. Hann kom heim aftur og livdi onnur 17 ár sum biddari fyri durunum hjá pápa sínum. Eftir deyðan varð hann skírdur halgimenni. Hann liggur jarðaður undir Pæturskirkjuni. Navnið er ein stytting av Alexandros, ið merkir verndarmaður.

18. juli. Arnolphus, deyður ár 641. Hann var biskupur í Metz. Eftir deyða hansara henda mong undurverk við grøv hansara, og hann varð skírdur halgimenni.

19. juli. Justa, deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hon og systirin Rufina, beindu fyri skurðgudamyndini Salambo í Sevilla Spaniu. Tær vórðu báðar píndar og tiknar av døgum. Navnið merkir tann rættvísa.